gult cyan magenta svart



# Eljustríð í samgonguni

**Hvøss orð fella í samgonuni fyri tíðina. Løgmaður og varaløgmaður skiftast um bæði skrivliga og munnliga at ákæra hvønn annan fyri at hava framt álitisbrot, sum kann vera endin á samgonguni**



*Ónøgd landsstýrisfólk í kjaki beint eftir landsstýrisfundin mikudagin*

*Mynd: John Johannesen*

BAKGRUND
*John Johannessen*

Eftir formliga landsstýrisfundin í gjár er veruliga vátt komið í reiðrið í samgonguni.

Løgmaður og varaløgmaður skýra hvønn annan fyri at hava brotið gjørdar avtalur, og harvið hava sett samgonguna í so stóran vanda, at ivasamt er, um hon kann bjargast.

Høgni Hoydal sigur, at løgmaður hevur brotið allar avtalur, nú hann hevur slept høvuðssetninginum hjá samgonguni um fullveldi.

Anfinn Kallsberg sigur, at Høgni Hoydal hevur spælt solospæl, tá hann móti vilja løgmans hevur borið uppskot um sjálvstýrisleist og uppskot um at staðfesta sjálvsavgerarrætt føroyinga í tingið. Anfinn Kallsberg ger somuleiðis greitt, at um Høgni Hoydal ikki tekur uppskotini aftur, hevur Tjóðveldisflokkurin meldað seg út úr samgonguni.

## Nýtt uppskot

Stríðið byrjaði fríggjadagin í farnu viku, tá løgmaður á samgongufundi boðaði restini av samgonguni frá, at hann ikki fór at góðtaka, at fólkaatkvøða verður hildin 26. mai um ein bundnan sjálvstrýrisleist, eins og landsstrýrið boðaði frá á tíðindafundi 1. februar.

Løgmaður gjørdi Sjálvstýrisflokkinum og Tjóðveldisflokkinum greitt, at hann metti fólkaatkvøðuna fara at falla, og at avleiðingarnar av hesum føru at vera ógvusligar.

Anfinn Kallsberg skivaði millum annað hetta í brævi til Helenu Dam á Neystabø og Høgna Hoydal dagfest hósdagin 22. februar:

»Seinastu veljarakanningarnar bendu eisini á, at meirilutin av føroysku veljarunum rokna við, at Poul Nyrup Rasmussen fer at halda fast við hóttan sína um at minka blokkin yvir 4 ár. Eg fari ikki út til fólkaatkvøðu, har útlit eru til at tillaga føroyska búskapin undir hesum fyritreytum. Tað havi eg boðað frá fleiri ferðir, og tað haldi eg fast við, tí tað er politiskt ógjøgnumførligt«.

Tí legði Anfinn Kallsberg í staðin eitt nýtt uppskot á sjálvstýrisleið fyri samgonguna. Hetta var eitt uppskot til samtyktar um at heita á landsstýrið um at arbeiða fyri at gera djútøkar broytingar í viðurskiftunum Føroya og Danmarkar ímillum. Uppskotið líkist nógv sjálvstýrislógini hjá Javnaðarflokkinum. Tað miðar eftir at yvirtaka øll málsøki uttan ríkismál innan fyri heimastýrislógina, víðka uttanríkispolitisku heimildirnar, minka heildarveitingina og seta á stovn ein búskapargrunn.

Fullveldi er ikki nevnt við einum orði í uppskotinum hjá løgmanni. Tí góðtaka Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin als ikki uppskotið.

Samgongufundurin fríggjadagin kom ikki til annað úrslit, enn at málið skuldi leggjast á ís, til løgmaður kom aftur til Føroya í næstu viku.

## Bar málið í tingið

Men málið hvíldi ikki leingi. Týskvøldið frætti løgmaður til London, at Høgni Hoydal hevði sett uppskot um sjálvsstýrisleist og fólkatkvøðu, uppskot um stuðul til fólkaatkvøðuna og uppskot til samtyktar um at staðfesta sjálvsavgerðarrætt føroyinga á skránna fyri formligan landsstýrisfund mikumorgunin klokkan.

Høgni Hoydal ætlaði, at málini skuldu kunna latast løgtingsskrivstovuni áðrenn klokkan 16 mikudagin, tá feistin fyri framløgu hesa tingestuna var úti.

Hetta leyp øði í løgmann, sum tíðliga mikumorgunin gjøgnum telefax av hotelli sínum sendi Høgna Hoydal hvassorðað bræv.

Í brævinum skrivaði Anfinn Kallsberg millum annað soleiðis:

»Um hesi málini fara niðan í løgtingið, uttan at flokkarnir í samgonguni eru samdir áðrenn, meti eg hetta sum so stórt álitisbrot, at eg taki hetta sum uppsøgn av politiska samstarvinum. Tí fari eg einaferð enn at fráráða tær hetta.«

Avleiðingin av hesum varð, at Høgni Hoydal, sum var virkandi løgmaður, fyrst úsetti landsstýrisfundin til á middegi og síðani til klokkan 13 meðan hann hugsaði seg um.

Landsstýrisfundurin varð settur eitt sindur seinni enn klokkan 13, og endaði hann við, at tvey uppskot í fullveldismálinum fóru fyri tingið. Eitt uppskot um sjálva fullveldistilgongdina, umframt eitt serligt uppskot til samtyktar, um at staðfesta sjálvsavgerðarrætt føroyinga.

Uppskotið um fullveldistilgongdina var tað sama, sum landsstýrið boðaði frá á tíðindafundi 1. februar, bert uttan fólkaatkvøðuna 26 mai.

Hetta leyp aftur øði í løgmann, og boðini frá Anfinn Kallsberg úr London vóru, at nú hevði Høgni Hoydal gjørt móti boðum løgmans, og at hetta fór at fáa avleiðingar. Men samstundis segði Anfinn Kallsberg, løgmaður, at hann fór at tosa við Høgna Hoydal, tá hann kom aftur til Føroya, og geva honum ein møguleika at taka uppskotið aftur.

Løgmaður kom aftur til Føroya í gjárkvøldið, og í dag fer løgmaður helst at tosa við Høgna Hoydal um støðuna.

Útlitini fyri at finna eina semju eru kortini lítil. Høgni Hoydal hevur sent løgmanni eitt bræv, har hann sigur, at hann ikki bakkar, og løgmaður hevur gjørt greitt, at Tjóðveldisflokkurin ikki longur er við í samgonguni, um hann ikki bakkar.

Høgni Hoydal hevur í brævi gjørt løgmanni greitt, at tað er ábyrgdarleyst at brúka hóttanir í politikki, og at tað er ábyrgdarleyst, at fullveldismálið skal gevast upp fyri skutil.

Tað stendur sostatt í botni í fullveldismálinum, og ivasamt er, um tað eydnast at finna nakara semju. Samgongan hevur aldri áður verið í so stórum vanda, sum nú.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður:

# Havi roynt at halda orð í fullveldismálinum

**– Um tað sum eg geri er at provokera, so er føroyskur politikkur fullkomiliga til láturs, heldur Høgni Hoydal**

FULLVELDI
*John Johannessen*

– Eg havi valt at gera eina seinastu roynd at halda orð í fullveldismálinum og at halda samgonuni fasta upp á sítt samgonguskjal.

Hetta sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður í fullveldismálum eftir at hann hevur borið eitt uppskot um fullveldisleist í tingið.

Hann hevur kunnað løgman.

– Hann váttaði, at vit ikki eru ósamdir um fullveldistilgongdina yvirhøvur, men at tað var fráboðaða fólkaatkvøðan, sum var knúturin.

Høgni Hoydal sigur, at lógaruppskotið um fullveldistilgongdina er ikki nakað uppskot frá Tjoðveldisflokkinum ella frá sær sjálvum.

– Hetta er tað uppskotið, sum hevur verið viðgjørt út í æsir síðani 26. oktober í fjør, har øll málsøki skulu yvirtakast, blokkurin minkast burt, búskapargrunnur setast á stovn sum ástetur, at tá allar bindingar eru burtur, skal ein fólkaatkvøða haldast um at skipa Føroyar sum fullveldisríki.

Høgni Hoydal leggur afturat, at uppskotið somuleiðis sigur, at vit longu frá 1. januar yvirtaka mál, so blokkstuðulin minkar við 3-400 milliónum.

– Eitt er, at ein flokkur er lopin frá fráboðaðu fólkaatkvøðuni. Men um samgongan ikki vil halda fast um fullveldisleistin, sum full semja var um fyri einum mánaði síðani, og um samgongan heldur ikki vil staðfesta sjálvsavgerðarrættin, so er eingin meining í nøkrum longum, sigur Høgni Hoydal, sum heldur, at tað er einki minni enn hansara skylda sum landsstýrismaður í sjálvstýrismálum at royna at halda samgonguni fasta upp á síni orð og at finna eina veg úr ruðuleikanum.

– Eg kann als ikki góðtaka, at tað nú verður sagt, at eg provokeri ella at tað er álitisbrot, at eg havi lagt hesi uppskot í tingið á einum málsøki, sum eg sjálvur umsiti.

– Er tað at provokera at halda sítt orð og at halda gjørdar avtalur? – Er tað álitisbrot at halda samgonguskjalið, ella er tað ein provokasjón at leggja uppskot fyri tingið um fullveldisleistin, sum øll vóru samd um fyri einum mánaði síðani? spyr Høgni Hoydal.

Um so er, so er føroyskur politikkur vorðin fullkomiliga til láturs. So er tað fyrstu ferð, at ein samgonga er komin í rasshaft, tí at samgonguskjalið, løgtingssamtyktir og avtalur



# Hetta er stór skomm

**– Eg kann ikki koma til aðra niðurstøðu enn at fólkaflokkurin hevur spælt sjónleik líka síðani síðsta samgongan varð skipað, sigur Jenis av Rana, løgtingsmaður fyri Miðflokkin**

FULLVELDI
*Áki Bertholdsen*



*– Tað var eitt stórt vónbrot, at Løgmaður skuldi boyggja seg fyri Óla Breckman. Nú er fullveldisætlanin kollsigld og tí eigur løgtingsval av verða nú, sigur Jenis av Rana, løgtingsmaður fyri miðflokkin*

– Hetta er stór skomm. Eg kann ikki koma til aðra niðurstøðu, enn at fólkaflokkurin ongantíð hevur meint nakað við fullveldi, men hevur spælt sjónleik, líka síðani samgongan varð skipað.

Jenis av Rana, løgtingsmaður fyri miðflokkin, sigur, at tað er onki hent, sum kundi fáa Løgmann at bakka so dyggiliga og at leypa frá avgerðini um at halda fólkaatkvøðu 26. mai.

– Tað er ikki langt síðani, at vit sótu í Kjaktorginum í útvarpinum og tíðindamaðurin førdi fram at »…Nyrup sigur…«

– Løgmaður kveistraði hann til viks, at tað var ikki Nyrup, sum gjørdi av, hvat vit atkvøddu um í Føroyum.

– Síðani er onki nýtt komið fram, sum kann elva Løgmanni og fólkaflokkinum til at bakka, sigur Jenis av Rana. Tí kann hetta ikki merkja annað enn, at fólkaflokkurin hevur spælt sjónleik alla tíðina.

## Løgnar royndir

Hann sigur, at tað er langt síðani at hann ásannaði, at tað komst ikki longur við samráðingum og longu í juni í fjør mælti hann til at halda fólkaatkvøðu.

– Síðani hevur landsstýrið gjørt ymsar løgnar royndir at lumpa danir til at fáa eina longri skiftistíð, men hetta haldi eg er grov undirmeting av dønum, tí sjálvandi gjøgnumskoða teir slíkt.

Jenis av Rana sigur, at tað, sum nú liggur næst fyri, er, at samgongan verður umskipað, so at tjóðveldisflokkurin fer út og javnaðarflokkurin fer inn.

– Javnaðarflokkurin stendur fult tilbúgvin og tað er eisini tyðiligt, at sjálvstýrisflokkurin hevur broytt støðu fyri at gera seg til reiðar fyri at vera við í eini samgongu ímillum fólkaflokkin, javnaðarflokkin og sjálvstýrisflokkin.

– Fríggjadagin stóð sjálvstýrisflokkurin øksl við øksl við tjóðveldisflokkin í spurninginum um fólkaatkvøðu, men nú er hevur hann broytt støðu so at hann tykist at hava nærkast fólkaflokkinum.

Sjálvur heldur Jenis av Rana, at tað ruddiligasta hevði verið at hildið nýval, so at veljarin slapp at fella sín dóm.

– Tað, sum nú er hent, er eitt punktum fyri teirra høvuðsmál í politikki, og tí eigur fólkið at sleppa at tala.

Hann sigur, at sjálvur hevur hann styðja fullveldisætlanina, men eftir tað, sum nú er hent, veit hann ikki.

Men um samgonga verður umskipað, veit hann ikki.

– Teir skulu fáa arbeiðsfrið fyri mær. Men eg veit ikki, hvat er eftir at semjast um, uttan tað, sum hevur borið til alla tíðina, nevniliga at yvirtaka ymisk málsøki so hvørt.

– Og nú orðið fullveldið ikki so mikið sum skal nevnast, dugi eg ikki at síggja, at nakað serligt er at samráðast um, sigur Jenis av Rana.

# Norðoyggjar skulu hava størri lut í ferðavinnuni

**Nýggi leiðarin á Norðoya Kunningarstovuni vónar, at Norðoyggjar kunnu lokka fleiri ferðafólk á vitjan. Men neyðugt er við miðvísum arbeiði, skal tað eydnast**

KUNNING
*Eyðun Klakstein*



*– Fólk hava gjørt eitt risa arbeiðið fyri lítlar og ongar pengar, og tað er hetta arbeiðið, sum eg skal byggja á, sigur Christian Olsen, nýggjur leiðari í Kunningarstovuni í Klaksvík.*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

Í gjár var móttøka fyri nýggja leiðaranum á Norðoya Kunningarstovu, sum samstundis tók við starvinum í gjár.

Tað er Christian Olsen í Klaksvík, sum framyvir skal verða oddafiskurin í kunningararbeiðnum hjá ferðavinnuni í Norðoyggjum, og hesa uppgávu gleðir hann seg til.

– Starvið er einfalt. Eg skal royna at gjøgnumføra tað, sum nevndin fyri Ferðavinnuna í Norðoyggjum og Klaksvíkar Kommuna vilja hava framt, sigur Christian Olsen.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, og harvið tekur Norðoya Kunningarstova eitt nýtt stig, tí higartil hevur meginparturin av arbeiðnum, sum hevur verið gjørdur, verið óløntur.

– Fólk hava gjørt eitt risa arbeiði fyri lítlar og ongar pengar, og tað er hetta arbeiðið, sum eg skal byggja á, sigur Christian Olsen.

## Handilslívið við

Klaksvíkar kommuna hevur latið fleiri pengar til arbeiðið á Kunningarstovuni, og saman við Ferðaráðið Føroya er tað kommunan sum í stóran mun fíggjar virksemið hjá Kunningarstovuni í Klaksvík.

Umframt kunningararbeiðið innan ferðavinnuna, skal nýggi leiðarin á Kunningarstovuni eisini taka sær av sambandinum við handils- og vinnulívið í Klaksvík.

– Handils- og vinnulívið í Klaksvík skal vera meiri sjónligt, og ætlanin er, at Kunningarstovan skal hjálpa til at føra ymiskt at felags áhuga út í lívið, sigur Christian Olsen.

Handilsfelag er í Klaksvík, og okkurt um 50 handlar eru limir í hesum felagi, og ætlanin er, at Norðoya Kunningarstova skal samstarva við hetta felag.

## Fleiri ferðafólk

Norðoya Kunningarstova skal eisini loysa ymsar uppgávur fyri Klaksvíkar kommunu. Millum annað í sambandi við vitjanir úr útlondum.

– Enn dugi eg ikki rættiliga at siga, hvussu tær ymisku uppgávurnar verða prioriteraðar, men eg kann ímynda mær, at um summarið verður øll orka løgd í at geva ferðafólki so góða tænastu sum gjørligt, sigur Christian Olsen.

– Norðoyggjar skulu hava størri lut í ferðavinnuni, og skal hetta eydnast okkum, er neyðugt við miðvísum arbeiði. Tað nyttar ikki hjá okkum at seta okkum at bíða eftir ferðafólki. Vit mugu hava tilboð til teirra og annars gera ymiskt arbeiðið fyri at fáa tey hendan vegin.

– Hetta arbeiðið má gerast í tøttum samstarvi við Ferðaráð Føroya, sum hevur so stóran týdning fyri føroyska ferðavinnu.

Christian Olsen heldur, at tað er umráðandi, at Norðoyggjar hava nakað at bjóða ferðafólki, og tað er av stórum týdningi, at hesi tiltøk verða løgd væl til rættis.

## Fingist við fólk

Christian Olsen er ikki ókendur innan ferðavinnu. Hann sigldi í 9 ár við Norrønu sum pursari, og hann hevur eisini siglt nakað við ferðafólki í Norðoyggjum seinastu árini.

– Mær hevur altíð dámt at fingist við fólk, og í so máta er hetta starvið áhugavert, sigur Christian Olsen.

Hann hevur skipað fyri hópin av tiltøkum, og í nógv ár var hann við í fyriskipanini av norðoyastevnuni. Hann hevur eisini verið upp í ymiskum felagsarbeiði.

– Eg fekk áhuga fyri leiðarastarvinum í Kunningarstovuni, tá lýst var eftir leiðara seinnu ferðina, og onkur helt eisini, at eg átti at søkt tað. Tað gjørdi eg eisini og fekk tað.

Seinnapartin í gjár var móttøka í Norðoya Kunningarstovu, og í dag er fyrsti gerandisdagurin hjá Christiani Olsen í nýggja starvinum.






gult cyan magenta svart